# Tríggjar nýggjar skúlabøkur

**Føroya Skúlabókagrunnur gevur út tríggja nýggjar skúlabøkur, Perbók eftir Jeffrei Henriksen, Eg Skrivi 3 eftir Gunnvá Dam og Minusbók eftir Katrina Gullbein**

BÓKAÚTGÁVA
*Tíðindaskriv*

Perbók. Lesibók við avmarkaðum orðatilfari eftir Jeffrei Henriksen er komin í nýggjari útgávu.

Hetta er lesibók til byrjanarlesing, ið nú kemur út í nýggjum búna. Herálvur Jacobsen hevur myndprýtt.

Perbók er gjørd við tí eina endamáli at veita venjing í lesing til teirra, sum tílíka venjing tørva. Nøkur av teimum vanligastu orðunum í málinum eru vald út og verða tikin upp í saman, til myndirnar av teimum munnu sita fastar í huga teirra, sum lesa. Byrjað verður við heilt stuttum orðum, men so við og við verða longri orð tikin upp ímillum hini. Perbók er 108 síður og kostar 82,00 kr. Hestprent hevur prentað.

### Eg skrivi 3 eftir Gunnvá Dam

Edward Fuglø hevur myndprýtt.

Hetta er triðja bókin í eini røð av mállærubókum við skrivligum uppgávum til miðdeild fólkaskúlans.

Mállæruheftini kunnu nýtast úr 4. flokki upp í 7. flokk, so sum lærarin heldur vera hóskandi.

Í hesari bókarøðini eru mállæruuppgávur, fyrisagnir, uppgávur til fyrisagnir, aftursagnir og ymiskar stuttligar uppgávur. Vegleiðing er í hvørjari bókini sær.

Eg skrivi 3 er 46 síður og kostar 68,00 kr. Grafik Studio hevur gjørt kápuna. Hestprent hevur prentað.

### Vit rokna. Minusbók eftir Katrina Gullbein

Astrid MacDonald hevur myndprýtt.

Minusbókin er ætlað sum ískoytistilfar í undirvísingini í støddfrøði. Bókin gevur næminginum høvi at arbeiða miðvíst við tølunum 1-100 og serliga við frádrátti.

Minusbókin er skipað soleiðis, at næmingurin lærir at draga tøl frá hvørjum øðrum við t.d. at spæla handil, veksla pengar o.s.fr.

Minusbókin kann brúkast, tá ið tørvur er á at læra og venja at draga frá í byrjanarundirvísingini. Tvær aðrar bøkur eru í røðini Vit rokna. Tær eru Talbók og Plussbók.

Minusbókin er 40 síður og kostar 48,00 kr. Ingi Joensen hevur gjørt kápuna. Prentumsiting hevur Reproz staðið fyri.




BROYTING

Ferðaráð Føroya hevur nú fingið nýtt telefonnummar og faksnummar

Telefonnummar: 355 800
Faxsnummar: 355 801

Ferðaráð Føroya
www.visit-faroeislands.com




## Bók um Johan Hansen í Kollafirði

**Heimamissiónsforlagið gevur út bók um Jóhan Hansen í Kollafirði, sum í staðin fyri at gerast sjómaður, gjørdist mannafiskari í Danmark**

BÓKAÚTGÁVA

Bókin »Johan« er útgivin hjá Lohse forlag í Danmark.

Hon er skrivað á donskum, og rithøvundurin er Peter Dahl.

Johan Hansen (f. 1917) í Kollafirði, greiðir í hesi bók frá barnaárum sínum í Føroyum, og om dreingjadreymar sínar um eitt lív sum sjómaður. Eisini sigur hann frá, hvussu kósin varð broytt, soleiðis at hann ístaðin kom at verða mannafiskari í Danmark. Frá 1945-1985 virkaði Johan Hansen sum trúboðari hjá Indre Mission í Danmark.

Bókin er ikki bert ein frágreiðing um hansara lív og upplivingar - hon er eisini ein eggjandi frásøgn um veking, arbeiðshug og álit á Guds orð. Eisini sigur hon eitt sindur um danska missiónssøgu.

»Jóhan« er skrivað av Peter Dahl, sum lesur teologi. Hetta er hansara fyrsta útgáva.

Bókin kann keypast á Heimamissiónsforlagnum tlf. 470000 ella á teldupostadressuni:hmf@mission.fo og í bókhandlunum runt um í landinum, hon kostar kr. 249,00, sigur Heimamissiónsforlagið.

## Sjeynda bók í ritverki Símunar av Skarði

**Í 1998 fór Forlagið Fannir undir at geva út ritverk Símunar av Skarði: »Streingir, ið tóna«. Turið Sigurðardóttir, bókmentafrøðingur, ritstjórnar verkinum**

BÓKAÚTGÁVA
*Forlagið Fannir*

Síðani fyrstu bók, »Yrkingar«, 1998, eru komnar: í 1999: »Søguligar greinir, skaldskapur og søga«, í 2000: »Skald og skaldskapur, mál og upplýsing, mentan og politikkur, lestrar, kvøður, ummæli«, í 2001: »Søgur og ævintýr«, í 2002: »Víggja-Glúms søga«, og í 2003 sjónleikirnir: »Vár« og »Víkingarnir á Hálogalandi«.

Nú kemur sjeynda bókin í røðini, skaldsøgan »Strondin bláa«, sum íslendski høvundurin Kristmann Guðmundsson (1902-1983) skrivaði upprunaliga á norskum. Upprunabókin kom út í Oslo í 1931, týðing Símunar í 1937, og ikki fyrr enn í 1940 kom bókin út á íslendskum - nógv stytt.

Hetta er sostatt 2. útgáva av føroysku týðingini.

»Strondin bláa« er ein menningarskaldsøga um dreingin Hákun, sum veksur upp á íslendskum garði á Skógarnesi, um vinskap hansara við gentuna Eialín, um hvussu hann kemur sær fram í íslendska høvuðsstaðnum og at enda leitar uttanlands.

Bókin er um 300 síður. Hon fæst bara innbundin í skreytbind og kostar kr. 330,- eintakið.



